## Nú eftir lodnu

Nú fiskirættindasáttmálin við Ísland fyri árið í árer komin upp á pláss, hava tey fyrstu svartkjaftaskipini lagt um til at fiska lodnu í íslendskum sjógvi. Funnur Fríði er farin á lodnuveiði, og Saksaberg, sum bara roynir við nót, er eisini farin á lodnu við Ísland. Annars hava svartkjaftaskipini havt gott fiskarí sunnanfyri. Tróndur í Gøtu landaði 2.500 tons í Fuglafirði um vikuskiftið, og í morginári landar Jupiter umleið 2.000 tons til Havsbrún.

## Summarhús í Gásadali

Á kommunuskrivstovuni í Sørvági hava tey ein langan lista við fólki, sum vilja sleppa at byggja sær summarhús í Gásadali. Tað skrivar kommunan á heimasíðu síni. Tann stóri áhugin er komin í sambandi við ætlanina hjá Paula Jacobsen at byggja summarhús í Gásadali. Hann eigur eitt øki í bygdini, sum er12.000 fermetrar, og har ætlar hann at byggja fleiri summarhús. Tey verða millum 40 og 70 fermetrar og verða bygd í føroyskum sniði.

# elbastað



Grýludansur .. har vaksa brobber og har veksur lyngur ....



*Prinsessa og mariuhøna: Hov nú er hon brotin!*



*Hóast Jónar bert er 2 ár, so slær hann sum ein ordiligur sjórænari*



*Eg eri ein farlig løva*



*Natanael smekkar til*